Semja millum:

**Maskinmeistarafelagið** øðrumegin

**og**

**Kommunala Arbeiðsgevarafelagið** hinumegin

Í sáttmálanum partarnar millum, sum fór úr gildi 1. oktober 2017, verða gjørdar hesar broytingar:

**Løn**

Lønin hækkar 1. okt. 2017 á øllum stigum 2,30%.

1. okt. 2018 verður nýggj lønartalva sett í gildi. Upphæddin á lønarstigi 16 í lønartalvu galdandi frá 1. oktober 2017, verður flutt yvir í nýggju lønartalvuna, til stig 11, og verða kr. 465,00, lagdar afturat hvørjum lønarstigi.

**§ 1, Stk 2. Viðbøtur.**

1. vaktmeistarar á Sundsverkinum, sum løntir eru eftir 12. lønarbólki, fáa fyri serliga ábyrgd eina mánaðarliga viðbót, sum er upphæddin í bólki "d", í viðbótartalvu.

Hetta galdandi frá 1. oktober 2018.

**§ 1, stk. 3 um starvssetan,** verður broytt soleiðis

"Tá ið starv verður lýst leyst, skal tað lýsast leyst alment, á ein slíkan hátt, at almenningurin verður kunnugur við lýsingina. Lýsast skal, hvat starvið umfatar og hvørjum lønarflokki, starvið verður lønt eftir.

Um starvstíðin er styttri enn 6 mánaðir, er ikki neyðugt at starvið verður lýst leyst alment."

**§ 5 Tilkallivakt:**

Stk. 2. Gjaldið fyri tilkallivakt verður goldið frá tí at tilkallivaktin tekur við til hon endar.

**§ 5 Eykagjøld:**

Stk. 5. Tann 1. januar 2019 hækkar tímataliið úr 3 tímum upp í 4 tímar.

**§ 12 Skipanarreglur:**

Ásetingin í § 12, stk. 8 um skipanarreglur viðv. starvsfólkapolitikki og samstarvsnevnd verður strikað.

**§ 14 Tænastuferðir:**

Ásetingin um tænastuferðir í § 14 verður dagførd soleiðis, at hendan framyvir fylgir avtaluni millum Tænastumannafelagið og Fíggjarmálaráðið.

**§ 19 Uppsøgn:**

Í §19, stk. 1 verður 3 mánaðir broytt til 6 mánaðir.

**§ 19, Stk. 6**: nýggj orðing

"Ætlar setanarmyndugleikin at siga maskinmeistara úr starvi, skal ætlanarskriv um uppsøgn verða latið starvsfólkinum til ummælis við 14 daga freist. Maskinmeistarafelagið fær fráboðan um, at ætlanarskriv er sent maskinmeistara."

**§ 2, stk. 3. Dagføringar**

Varaverkmeistarin á Vágsverkinum verður flokkaður sambært stig 34.1 eftir lønartalvuni hjá Tænastumannafelag Føroya. Flokkingin verður sett á listan yvir starvsfólk í leiðandi størvum.

Sáttmáli og lønartalva verða dagførd sambært omanfyristandandi.

**§22 Gildi sáttmálans**

Hesin sáttmáli hevur gildi frá 1. okt. 2017 og kann sigast upp við 3 mðr. freist til tann 1. í einum mánaða, tó í fyrsta lagi tann 1. okt. 2019.

**<u>PROTOKOLLAT</u>**

**Veitingartrygd:**

Arbeiðsbólkurin, sum er settur at arbeiða við veitingartrygdini á SEV, heldur fram.

Arbeiðsbólkurin, skal gera eitt tilmæli um, hvussu ein arbeiðsskipan skal síggja út, tá ræður um veitingartrygdina hjá SEV, harundir, hvussu ein kann fyribyrgja havarí á el-skipanina o.a. líknandi, sum kann viðføra skaða uppá el-skipanina – og harvið møguliga eisini streymslit.

Miðið verður ímóti, at hetta arbeiðið verður liðugt áðrenn 1. apríl 2019.

**Bygnaður á Sundi.**

Arbeiðsbólkurin, sum varð settur til at viðgera starvsliga bygnaðin í sambandi við útbyggingar á Sundsverkinum, heldur fram við tí endamáli, at tillaga starvsliga bygnaðin til tann tørv og tey krøv, sum standast av útbyggingini.

Í Tórshavn 19. oktober 2018

**Maskinmeistarafelagið**

*Ólavur Gunnarsson*
*formaður*

*Regin Olsen*
*næstformaður*

*John Højsted*
*nevndarlimur*

**Kommunala Arbeiðsgevarafelagið**

*Annika Olsen*
*formaður*

*Poul Andreas Joensen*
*nevndarlimur*

*Bogi Bendtsen*
*nevndarlimur*

*Anita Fuglø*
*samráðingarleiðari KAF*